DAGSINS MEINING

Ráðstevna í Føroyum um blokk og búskap

Í orðaskiftinum í seinastuni um hvør segði hvat og ikki, í samband við ráðstevnuna hjá Norðuratlantbólkinum, er ymiskt, ið átti at verið ósagt. Spell at nógv er vorðið misbrúkt, misskilt og mistulkað og m.a. hevur ført til, at navngivnir persónar sum eitt nú formaðurin í Búskaparráðnum, hava verið fyri ov hvøssum og í summum førum beinleiðis órímuligum atfinningum.

Lat okkum koma víðari. Og ikki steðga her við kegli og ósemjum, ið onga leiða føra. Vit ivast ikki í, at her í Føroyum eru nógv, ið kundu hugsað sær at sagt sína hugsan um, hvørja ávirkan blokkurin hevur á føroyska samfelagið. Vit síggja í næstan øllum málum viðvíkjandi búskapi, so er serfrøðin so langt frá á einum máli viðvíkjandi hesum, og tí er týdningarmikið, at vit stimbra kjakið her í Føroyum fyrst og fremst.Og lat tað vera sligið fast, at sjálvandi skal ein serfrøðingur sum formaðurin í Búskaparráðnum ongantíð vera bangin fyri at trína fram við sínum sjónarmiðjum, tí annars gerst almenna tjakið alt ov fátæksligt. Tvørturímóti tørvar okkum, at serfrøðingar av alskyns slag í nógv størri mun geva sítt íkast til samfelagskjakið. Tað er eisini teirra skylda. Í nýggja debatforum okkara, Tinghelluni, bjóða vit til eitt slíkt orðaskifti.

Tá nú hetta tiltak, ið Norðuratlantsbólkurin skipaði fyri og tað mesta av eftirspælinum er farið framvið borðinum, latið okkum lita frameftir og royna at lýsa málið um blokkstuðulin og búskapin út í æsir her í Føroyum við á eini ráðstevnu. Hetta mátti havt áhuga hjá øllum politiskum flokkum og ikki minst millum føroyingar, ið kanska hava gloymt søguna hjá blokkstuðlinum.

Tað eru bert 16 ár síðani blokkstuðulsskipanin bleiv innførd av táverandi samgongu millum Javnaðar-, Tjóðveldis-, Sjálvstýris- og Framsóknarflokkin. Skipanin avloysti refusiónsskipanina og var hildin at verða eitt stórt framstig í føroyskum sjálvræði. Tað kundi verið áhugavert at hoyrt, hvørjar tær politisku grundgevingarnar ´vóru fyri hesi skipan.

Søgan er sera týdningarmikil at kenna, tí annars gerst kjakið rótleyst óansæð hvat fakøki talan er um. Eitt búskaparligt orðaskifti um blokkin, skal sjálvandi verða á einari slíkari ráðstevnu, ið vit skjóta upp, við luttøku frá serfrøðingum úr tí privata eins væl og frá tí almenna. Viðhvørt kunnu munir verða á, í hvørjum perspektivi samfelagið verður sæð frá, hjá hesum báðum bólkum. Tað kundi verið gott at fingið eitt breitt orðaskifti, ið kanska kundi ført okkum eitt sindur framá. Konsensus fer man sjálvandi ongantíð at fáa, so leingi talan er um búskaparfrøði, ið so langt frá er ein eksakt vísund.

Tað skal verða okkara áheitan á politikarar og eitt nú føroyskar búskaparfrøðingar at royna at fáa í lag eina slíka ráðstevnu um blokkin og búskapin her í Føroyum. Tað er eftir øllum at døma ein stórur tørvur á at varpa ljós á og skifta orð um, hvørja ávirkan blokkstuðulin hevur á føroyska samfelagið og hvønn leiklut hesin skal hava í framtíðini. Hetta er komið sjónliga til sjóndar í seinastuni og eru meiningarnar sera ymiskar – eisini millum fakfólk. Men latið okkum fáa eitt opið og sakligt orðaskifti.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Skeiv endurgeving í Sjónvarpi Føroya

Í Degi og Viku mánakvøldið og týskvøldið gjørdi Sjónvarp Føroya nógv burtur úr ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum á Christiansborg og leiklutinum hjá Hermanni Oskarssoni, sum er formaður í Búskaparráðnum.

Innslagið gav hyggjarunum ta fatan, at Sosialurin nýtti fleiri síður í blaðnum, forsíðuna og »matarlepan« til kritikk móti Hermanni Oskarsson, tí hann skuldi havt sagt, at blokkstuðulin úr Danmark er skaðiligur.

Dramatiskt vísti tíðindamaðurin á forsíðuna á Sosialinum, har tað stóð: Øsir danir upp móti føroyingum«. Eisini sóu vit »matarlepan« hjá Sosialinum á hurðini hjá P. A. Restorff í Havn við somu yvirskrivt, sum tíðindamaðurin eisini segði vera »svarið til Hermann Oskarsson«.

Síðani vórðu vístar myndir av tveimum blaðsíðum í Sosialinum, har blaðið prátaði við løgmann, varaløgmann og fíggjarmálaráðharran. Eisini varð víst mynd av blaðhúsinum hjá Sosialinum á Argjum, meðan dramatikkurin um »álopið« á Hermann Oskarsson helt fram.

Í einum hjásetningi varð víst á eitt bræv frá Óla Jacobsen, sum eisini varð prentað í sama blað. Hetta var ein kæra, sum Óli Jacobsen, formaður Fiskimannafelagsins, hevði sent løgmanni. Hetta snúðið seg um Hermann Oskarsson!

Sum blaðstjóri á Sosialinum hvakk eg við! Eg mátti lesa greinarnar um aftur, fyri at vita, um tað var eg ella sjónvarpsmaðurin, ið fullkomiliga hevði misskilt tað, sum stóð í Sosialinum hendan dagin.

Eg gjørdi mær tann ómak at tosa við sjónvarpsmannin í dagin eftir, og hann »noteraði kritikkin«. Kortini tók hann afturíaftur »álopið« í Sosialinum í Degi og Viku týskvøldið og vísti á skíggjanum aftur forsíðuna við »álopinum á Hermann Oskarsson«.

Innihaldið í øllum trimum samrøðunum var um ráðstevnuna hjá Norðuratlantsbólkinum, har løgmaður, varaløgmaður og fíggjarmálaráðharrin vístu á, at teir hildu tað vera skeivt av Tjóðveldisflokkinum at draga føroyskan politikk til viðgerðar í Danmark. Einki varð nevnt um Hermann Oskarsson, uttan í einum setningi í samrøðuni við Bjarna Djurholm.

Í forsíðuávísingini var ikki eitt orð nevnt um Hermann Oskarsson, og tað var heldur ikki tikið við í metingina, tá forsíðan var gjørd, tí høvuðsyvirskriftin snúði eina og aleina um tað, at landsstýrismenninir halda, at Tjóðveldisflokkurin øsir danir upp ímóti føroyingum.

Hinvegin so valdu vit hendan dagin at tosa við Hermann Oskarsson og spyrja hann, hvat hann segði til skuldsetingarnar frá Óla Jacobsen. Hetta kom eisini á forsíðuna, har Hermann Oskarsson segði seg hava »alt upp á tað reina«. Maðurin var álopin í einum opnum brævi til løgmann, og hann slapp at verja seg í Sosialinum.

Tað var søgan um Hermann Oskarsson í Sosialinum hendan dagin. Tað harmar okkum ómetaliga nógv, at Sosialurin skal verða misbrúktur á ein so ósømiligan hátt av Sjónvarpi Føroya í hesum máli.

Eirikur Lindenskov, blaðstjóri

Til: VirVar T. Dalsgaard

Sum gvaggandi dunna,
tú larmar sum tunna.
Við orðum tú sleingir,
og føroyingur heingir.
Betur tú tagdi,
og legði úr lagdi.
Breyt upp um armar,
at byggja upp karmar.
Tá blívur tú fegin,
tí lívið er gleðin.
Ringt er at fara,
og frá foldini snara.
Ongantíð glaður,
bert súrur maður.
Farin frá fold,
gákur fullur í mold.

Mourits Mohr Joensen

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða ráðfestar lægri, og føroyingur bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Tjóðveldisflokkurin má koma við eini umbering

Alfred Olsen
løgtingsmaður

Staddur á ráðstevnu, sum Útnorðurráðið skipar fyri í Reykjavík, har allir flokkar í Føroyum, uttan Tjóðveldisflokkurin eru møttir, havi eg fingið at vita, at formaðurin í Tjóðveldisflokkinum er misnøgdur við eitt lesarabræv, sum eg hevði í bløðunum um skattafrádráttin hjá sjómonnum, og sum varð skrivað í kjalarvørrinum av ráðstevnu, sum Tjóðveldisflokkurin var við til at halda á Kristiansborg.

Tað er ein óreiniligur veruleiki
- at ráðstevnan var hildin á Kristiansborg
- at Kristian Thulesen Dahl boðaði frá eftir ráðstevnuna, at blokkstuðulin til Føroya átti at minka, tí at føroyskir sjómenn skúmaðu fløtan og livdu í einum skattaparadísi.
- at umboð fyri Tjóðveldisflokkin á løgtingsins røðarapalli hevur boðað frá, at stuðulin til sjómenn eigur at vera tikin burtur.
- at formaðurin í Tjóðveldisflokkin var endurgivin í Berlingske Tidende tann 4. juni fyri at siga, at tað er skeivt at ein bólkur í Føroyum hevur serrættindi á skattaøkinum.
- og at ráðstevnan hevur skapt eina øsing, sum ikki hevur verið til gagns fyri føroyska samfelagið.

Um nakar hevur krav uppá umbering, so eru tað Føroya fólk, sum hevur krav uppá eina umbering frá Tjóðveldisflokkinum fyri ráðstevnuna á Kristiansborg. Tað er ikki Tjóðveldisflokkurin, ið skal hava umbering frá teimum, sum vilja vísa á, hvørjar skaðiligar fylgjur ráðstevnan kann fáa fyri føroyska samfelagið.

Opin tøkk til Jørn Astrup

Ólavur Rasmussen
Leirar, 10. juni 2004



At føroyingar eru trongskygdir og skoða heimin gjøgnum eitt lyklarhol er ein sannroynd, sum ikki nýtist nakra vísindaliga dokumentatión. Tað er ivaleyst at lesa bløðini fyri at fáa hetta staðfest. Men tað eru glottar, sum tora at seta seg í veð fyri øllum tí erkivísni og smáligum kegli, hetta inniber, til frama fyri eina frameftirlítandi debatt og tí fyriliti vit altíð muga taka í einum heimi, sum broytist so skjótt sum ongantíð áður. Nú um dagarnar bar tó av, tá ið keglið og smáligheitirnar fingu so stórar dimensiónir, at ein setti sær sjálvum álvarsaman spurning við, um tað er av tilvild, at dreparasngilin hevur leitað sær til Føroyar fyri at fáa rásarúm, gróðrarlíkindi og luft!

Tí lætnaði tað um hjartað, tá ið Jørn Astrup Hansen, bankastjóri, í Degi og Viku týskvøldið 8. juni setti øllum skilaleysum vrøvli knívin á strúpan. Fyri neyðini at onkur torir at tala at og seta tað minstamark fyri kritikki, at hann fyriheldur seg til tað, sum veruliga verður ført fram og ikki til tað, sum vit nú einaferð meina um hvønn annan, tí so verður eingin endi á runubløkum og illgitingum.

Takk fyri, Jørn Astrup, tíni orð gjørdu tað eitt sindur hugaligari at vera føroyingur undir tí tokukleimi, sum hongur yvir okkara landi. Her meini eg við veðrið, fyri at sissa teir erkvisnu - sum vónandi eina aðru ferð ikki glaðbeintir fara í sjálvbodna andaliga likvidatión um slíkt, sum teir bara illgita um. Tí hetta land hevur veruliga brúk fyri, at mál av alskyns slag verða sett undir álvarsaman, sakligan debatt.

Heimaútróður

Kári P. Højgaard
Løgtingsmaður



Seinastu árini hevur heimaútróðurin havt góðar dagar við methøgum prísum og góðari veiði. Nú er nógv sum bendir á, at tey góðu árini eru av og at fiskiskapur og prísir koma aftur í eina meira vanliga legu.

Undir valstríðnum seinast, høvdu politisku flokkarnir ymisk vallyftir. Tveir teirra Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin lovaðu m. a. at bátar undir eina ávísa stødd skuldu fiska frítt, uttan fiskiloyvi.

Fyri stuttum boðaði løgmaður frá, at arbeitt verður við broytingum. Tað kann tykjast løgið, at tað er løgmaður og ikki landstýrismaðurin í fiskivinnumálum, ið kemur við fráboðanini.

Eg fari inniliga at heita á landstýrismannin í fiskivinnumálum, um at umhugsa gjølla tær ætlaðu fráboðaðu broytingarnar, so tær ikki taka grundarlagið undan fult - og partvísu riknu útróðrarbátunum.

Vinnan hevur í nøkur ár tillaga seg skipanina við A og B loyvum. Nú størru útróðrarbátarnir og skipini hava fingið fráboðanarútgerð, sum greitt sigur frá, hvar bátarnir eru staddir, er neyvt eftirlit við, at fiskiskapurin fer fram eftir galdandi lógum og reglum.

Umframt nógv lækkaðar fiskaprísir, er agnprísurin hækkaður almikið, so at í dag kostar eitt kg. av høgguslokki áleið 16 kr., og makrelur 9,- kg. Tað man tátta í tvey hundrað krónur at fáa ein stamp engdan, so fiskiskapurin skal verða væl omanfyri tey hundra pundini/stampin, fyri at fáa brúkiliga inntøku til far og manning.

Sjálvstýrisflokkurin hevur fyrr víst á tann týdningarmikla leiklut, "lokalu universitetini", egningarskúrarnir hava. Hesir standa niðri í fjøruni ella á havnalagnum í hvørjari útróðrarbygd, og hava uttan politiskan stuðul ment børn okkara til at møta komandi lívsins avbjóðingum á skipsdekki, so ungdómar frá fyrsta degi kunnu arbeiða sum rættir fiskimenn. Ongin er føddur við kynstrinum og nógvar fløkjur við hartil hoyrandi útreiðslum og stríði skulu til, áðrenn ein hevur lært kynstrið at egna og kunna rópa seg fyri royndan línumann. Hetta undirvísingararbeiði hevur landformaðurin og hinir egnararnir lært frá sær ókeypis. Næmingarnir fáa løn fyri arbeiðið eftir avriki, og gevur hetta ein sunnan kappingarhug.

Eg fari her at heita á Bjørn Kalsø landstýrismann um at taka hesar viðmerkingarnar við í samlaðu ætlaninar.

1. Hvørjar avleiðingar fær tað fyri útróðrarflotan um skipanin við fiskiloyvum fyri smærri før verður avtikið ?
2. Set eina kanning í verk sum útgreinar, hvussu stór tilgongd hevur verið til sjóvinnuna árliga, tey seinastu 10 árini.
3. Hví fingu fólk hug til sjógvin. Hava hesi í uppvøkstrinum regluliga havt sína gongd í einum egningarskúri og er umhvørvi viðvirkandi til, at havið dregur ?
4. Arbeiðast má fram móti eini skipan, sum kann geva eitt førleikaprógv innan allar praktiskar vinnugreinar á sjógv og landi, tað veri seg trol, línu, nót, flakavinnu etc.

Fiskivinnan er primervinna okkara og eigur eisini at viðgerast við tí álvara sum liggur í hesum. Um útróðurin eru at gera tíðandi broytingar v.v. fiskiloyvum, mugu hesar sjálvsagt gerast í samráð við avarandi yrkisfeløg og teir sum verða ávirkaði av hesum.

Ein liðiligari skipan eigur at vera, so bátar sum bert hava eini 75 fiskidagar, ikki verða trektir fyri eyka fiskidag, um streymviðurskifti, slit ella aðrar orsøkir gera, at tú verður ein til tveir timar seinkaður, so fari verður út um eitt fiskidøgn.

Tað er alneyðugt, at ein støðug framhaldandi tilgongd av ungfólki er til sjógvin, sum er, og í nógv ár framyvir, verður lívsgrundarlag føroyinga.

Ps. Ein fólkafloksmaður norðanfjørðs Jákup Mikkelsen, hevur reist spurningin um at fáa trol og nótaarbeiði góðkent sum lærugrein. Heimaútróður við húki hevur verið álitið hjá norðoyingum, og løgtings - eins væl landstýrismaðurin eru uppvaksnir í hesum umhvørvi. Tí er vón mín, at allar góðar kreftir verða settar inn at geva eisini hesum parti av vinnuni bestu sømdir.

Føroyingar skilja ikki boðskapin hjá Búskaparráðnum

Sambandsflokkurin
Kaj Leo Johannesen



»Danir skilja boðskapin« var ein av yvirskriftunum í Dimmalætting leygardagin 29. mai. Undir hesi yvirskriftini greiddi formaðurin í búskaparráðnum frá tí, sum hann hevði sagt á nógv umtalaðu ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum á Kristiansborg.

Men trupulleikin er, at meðan danir sambært formanninum í búskaparráðnum skilja boðskapin, so er einki sum bendir á, at føroyingar skilja hann, og tað er hóast alt føroyingum, búskaparráðið skal veita ráðgeving.

Hvar liggur so trupulleikin? Eru tað føroyingar, sum ikki skilja ein einklan boðskap, ella er tað búskaparráðið, sum ikki dugir at gera boðskapin fatiligan? Ella er trupulleikin kanska tann, at boðskapurin als ikki samsvarar við ta vitan, sum føroyingar frammanundan hava á økinum?

Tað hevur stóran týdning, at búskaparráðið og føroyskir politikarar samskifta væl sínámillum, men fyrt at hetta skal lata seg gera, er neyðugt at báðir partar »senda á sama frekvensi«.

Tað eru nú tvær vikur síðani Sambandsflokkurin spurdi búskaparráðið ein spurning í sambandi við úttalilsini, sum formaðurin í búskaparráðnum hevði í eini tíðindasending hjá Danmarks Radio, sama dag sum nógv umrødda ráðstevnan var á Kristiansborg, men framvegis er einki svar komið.

Onkrar viðmerkingar hava verið um, at tey sum hava luttikið í kjakinum um ráðstevnuna vóru ikki hjástødd, tá ráðstevnan varð hildin, og at tey tí ikki áttu at luttikið í kjakinum. Men okkara spurningur hevur einki við ráðstevnuna at gera. Hann bygdi einans á tað, sum formaðurin í búskaparráðnum segði í viðtalu við Danmarks Radio.

Sum áður sagt, so átekur Sambandsflokkurin sær ongan rætt til at ávirka búskaparráðið politiskt, men flokkurin stendur spyrjandi yvir fyri úttalilsunum, sum formaðurin í búskaparráðnum hevði í Danmarks Radio tann 25. mai, og vil tí enn einaferð spyrja, um búskaparráðið og tess limir veruliga halda, at ein milliard, sum ikki verður brúkt, kemur inn í føroyska samfelagið, og at vit onga nyttu fáa burturúr hesi milliardini áðrenn hon verður send av landinum aftur?